# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samfelagið er fyri øll

Við føstum millumbilum verður happingin í samfelagnum umrødd. Myndugleikar tykjast kenna trupulleikarnar, men kortini er hetta ein afturvendandi trupulleiki. Samfelagið er fyri øll, og samfelagið skal vera fyri øll. Hetta merkir, at eingin skal vera fyri mismuni, og hetta merkir so aftur, at einki slag av happing eigur at verða góðtikið – tað veri seg alment ella í stillum.

Sjálvsagt eiga vit at lóggeva móti happing og mismuni. Men her skal eisini annað og meira til. Happing av teimum, ið á ein ella annan hátt eru øðrvísi enn meirilutin, er ein spurningur um hugburð og mentan. Hesi viðurskifti verða fyrst og fremst ávirkað í barnaárunum, í dagstovnum og í fólkaskúlanum. Tað er her samfelagið eigur at seta inn ongantíð ov skjótt.

Men eisini foreldur hava stóra ábyrgd, og her eigur samstarvið millum heim og skúla at hava avgerandi leiklut. Eisini fjølmiðlarnir hava ábyrgd og kunnu fremja ta upplýsing, ið kann bøta um støðuna. Hetta samfelagið er fyri øll, og øll hava vit eina ábyrgd fyri, at henda visjón kann gerast veruleiki. Eingin skal verða fyri mismuni orsakað av húðaliti, átrúnaði, kynsligari orientering, breki ella øðrum møguligum "orsøkum".

Í seinastuni er støðan hjá teimum samkyndu aftur komin fram í ljósið. Vit kunnu ikki sum einasta norðurland standa við eini lóggávu sum nærmast legaliserar happing av samkyndum, og tað er so eisini í andsøgn við altjóða rákið og tey lond, sum vit oftani samanbera okkum við.

**Sosialurin**

## Tillukku til Boga og Fiskirannsóknarstovu

Tað er einki minni eitt bragd, at ein av okkara frægu granskarum hevur fyri altjóða viðurkenning fyri sítt arbeiði. Bogi Hansen fekk í gjár norðurlendsku umhvørvis- og náttúrvirðislønina fyri sítt miðvísa og slóðbrótandi granskingararbeiði. Eisini hevur hann fingið hesa virðisløn fyri sín sera virkna leiklut í almenna orðaskiftinum, har hann aftur og aftur hevur gjørt vart við tann týdning tað hevur, at almennu Føroyar eru við til at minka um dálkingina. Henda virðisløn er so eisini eitt herðaklapp til tann stovn, sum hevur givið Boga umstøður at realisera síni evni og gávur . Fiskirannsóknarstovan, sum ikki eigur stóra virðing millum nógvar politikarar, eigur rós uppiborið fyri at hava skapt eitt granskingarumhvørvi, ið sømir seg framkomari tjóð. Vit vilja tí ynskja bæði Boga Hansen og arbeiðsumhvørvi hansara í Nóatúni tillukku við hesi viðurkenning.

**Sosialurin**

# Tað góða samfelagið og fíggjarlógin

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



**2. partur**

**Um rehabilitering og rúmligan arbeiðsmarknað**

Eitt av raðfestu økjunum á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007 er rehabilitering og rúmligur arbeiðsmarknaður.

**Rehabilitering**
Rehabilitering snýr seg um, at fólk sum av sjúku ella skaðatilburði hava mist sín arbeiðsførleika, skjótast gjørligt eftir, at tey eru útskrivað av sjúkahúsinum, skulu fáa neyðuga uppafturvenjing. Endamálið er at tey skulu kunnu koma fyri seg aftur sum skjótast og endurvinna sín arbeiðsførleika og virkisførleika annars. Henda uppafturvenjingin kann so verða fyri styttri tíð, tá tað gongst væl, ella viðvarandi, tá tað ikki gerst meir enn at viðlíkahalda ein ávísan avmarkaðan virkisførleika. Endamálið er sum sagt at man í mest møguligan mun skal verða førur fyri at klára seg sjálvan.

Í Føroyum er støðan tann syndarliga, at eftir at fólk eru útskrivað av sjúkahúsið er ongin skipað rehabilitering, sum tekur við. Hetta mugu fólk sjálvi berja seg til á ymiskan hátt, og tað kann viðføra at man kemur alt ov seint til uppafturvenjing og tí kanska ikki kemur so væl fyri seg aftur, sum man annars kundi.

Tí er nú gjørt av at fara undir eina verkætlan um at gera eina rehabiliteringsskipan fyri Føroyar. Á fíggjarlógini verða pengar settir av til ein verkætlanarbólk við løntum samskipara, sum nú fer ígongd við at gera eitt uppskot til eina skipan, sum skal verða klárt í apríl komandi ár. Ætlanin er at tey bæði smærri sjúkrahúsini, Suðuroyar og Klaksvíkar sjúkrahús, skulu vera miðstøðir í eina landsfevnandi rehabiliteringsskipan. Uppskotið skal útgreina, hvørji tilboð brúk er fyri, hvussu tey skulu skipast, hvørjar starvsfólkaressursir krevjast og hvørjir fasilitetir krevjast – og møguligar íløgur í nýggjar fasilitetir - bæði til uppafturvenjingina og til at hýsa sjúklingunum á staðnum, meðan hetta fer fram.

**Rúmligur arbeiðsmarknaður**
Rúmligur arbeiðsmarknaður snýr seg um, at fólk við skerdum førleika skulu kunna gerast partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum, har til ber. Til tess eru gjørdar almennar skipanir við endurbúgving og vardum størvum, sum arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni skipar fyri. Hóast hesar skipanir er tað ein sannroynd, at tað er torført hjá førleikaskerdum fólki at koma á og varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Tað er eisini ein sannroynd, at fólk mangan sleppa ikki upp í part longur, tá ið tey fáa brek ella sjúku seinni í lívinum.

Fyri at bøta um hesi viðurskifti er neyðugt at seta munagóð tiltøk í verk. Tí verða pengar settir av á fíggjarlógini til eina mundandi styrking av arbeiðsmarknaðardeildini á Almannastovuni, sum skal vera karmur um ein serligan innsats fyri at útvega arbeiðstilboð, so fleiri fólk við skerdum førleika kunnu koma á arbeiðsmarknaðin og í lønandi vinnu.

**Lægsta fyritíðarpensjón skal takast av eftir 2 árum**
Umframt at útvega fleiri arbeiðstilboð skal eisini tilskundanin til lønandi vinnu betrast við at lækka mótrokningina í pensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%. Og frá 1. jan. 2007 skal inntøkuloftið hjá lægstu fyritíðarpensjonistum setast mundandi upp.

Við hesum politisku tiltøkum vera skaptar fyritreytir fyri at lægsta fyritíðarpensjón verður tikin av 1. jan. 2009. Hetta kann gerast í tveimum stigum, so at longu 1. jan. 2008 verður lægsta fyritíðarpensjón hækka, so at bara helvtin verður eftir av muninum upp til miðal fyritíðarpensjón, og 1. jan. 2009 verður allur munurin upp til miðal fyritíðarpensjón tikin burtur, so at tá hvørvur lægsta fyritíðarpensjón og eftir verða bert miðal og hægsta fyritíðarpensjón.

**Nýggj verkstaðartilboð í vardum umhvørvi**
Tað fara tó altíð at verða fólk við skerdum førleika, sum ikki kunnu átaka sær arbeiði á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Tí er neyðugt við vardum verkstaðum. Á fíggjarlógaruppskotinum verða tí settir pengar av til at skipa 2 nýggj verkstaðartilboð. Annað er ein stór verkætlan hjá ALV um at skipa ein nýggjan framleiðsluverkstað fyri sinnisveik í Eysturoynni. Og hitt fer Blindafelagið at standa fyri sum eitt verkstaðartilboð til seinment sjónveik.

# Árligt tombola hjá TB

**Leygardagin og sunnudagin skipar TB fyri tombola í TB húsinum og góðir vinningar eru til tey hepnu**

**SPÆL**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 7. og 8. oktober skipar TB fyri árliga tombolaspælinum í TB húsinum. TB hevur havt hetta á skránni sum afturvendandi tiltak og undirtøkan hevur verið góð.

Og tey hepnu kunnu eisini vænta sær góðar vinningar, tí millum vinningarnar er olja, seyður og matur.

Klokkan 22 sunnukvøldið verður drigið millum lutaseðlarnar, sum eru seldir hesa vikuna.

Tombola í TB húsinum byrjar leygardagin klokkan 19 og sunnudagin klokkan 16.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.